# Ung á summarlegu

**Ung úr Føroyum og úr tíggju øðrum londum fara í sumar á legu í Hillerød**

SUMMARLEGA
*tíðindaskriv*

Aftur í ár eru føroyingar bodnir við á norðurlendsku summarleguna í Hillerød í Danmark.

Legan er fyri 11 til 14 ára gomul úr Danmark, Finnlandi, Grønlandi, Íslandi, Norra, Svøríki, Álandi, Estlandi, Lettlandi, Litava og Føroyum. Hon verður frá 4. til 10. juli 2005.

Summarlegan er í náttúruvøkrum umhvørvi á Sælandi, har sum skipað verður fyri hópinum av uttandura og innandura ítrívum, spølum og ítrótti. Útferð verður gjørd til Keypmannahavnar, eitt nú í Tivoli.

Prísurin er 1.600,00 kr. umframt ferðina til Hillerød og heim aftur til Føroya.

Í fjør vóru 15 ung úr Føroyum á summarleguni í Hillerød.

Á heimasíðuni www.nordlejr.dk fæst meira at vita um summarleguna, sum er fyri 90 ung úr 11 londum.

Umsóknarfreistin er til 2.mai. Umsóknarblað fæst frá Norrøna Felagnum í Føroyum, J. Patursonargøtu 24 í Havn, tlf. 217999. Eisini ber til at tekna seg á heimasíðuni www.nordlejr.dk Og teldupostur kann sendast til info@nordlejr.dk.

# Harmoniku-treff á Viðareiði

**Harmonikutónleikur og grillaðir búffar verða á skránni á Viðareiði um knappar tvær vikur**

HARMONIKUTREFF
*Jákup Mørk*

5. mars skipar Hotel Norð á Viðareiði fyri stórum harmonikutreffi, har harmonikuleikarar kring landið fara at hitast.

Talan er eftirhondini vorðin um eitt afturvendandi tiltak, sum hevur verið hildið ymsastaðni kring landið, og sum í ár altso verður á Viðareiði.

Um kvøldið koma leikararnir at taka lut í stóra grillkvøldinum, sum Hotel Norð skipar fyri, við tónleiki, undirspæli til felagssang og dansi.

Grillkvøldið, sum byrjar klokkan 19.00, er alment, og borðreitt verður forrættið, ymiskum sløgum av búffum og dessert og kaffi.

Almenni dansurin byrjar eftir borðhaldið og verða tað 3 ymisk harmonikulið sum koma at skiftast at spæla.

# Framsýning á Húsarhalds-skúlanum

FRAMSÝNING
*tíðindaskriv*

Skeiðið hjá teimum 21 næmingunum, sum hava gingið á Húsarhaldsskúla Føroya er um at verða liðugt. Í hesum sambandi skipa næmingarnir á skúlanum fyri stórari framsýning av tí handaliga arbeiðinum, sum teir hava arbeitt við teir seinastu 7 mánaðirnar. Undirvíst hevur verið í hondarbeiðslærugreinunum, binding, tilskering, seyming, silkimáling, føroysk bond og tøving.

Á framsýningini verður høvi hjá teimum vitjandi at fara á cafe og fáa ein góðan køkubita, sum næmingarnir hava baka afturvið einum góðum kaffimunni.

Framsýningin er opin týsdagin, 22. februar.

## HEILSANIR



**Góða elskaði Regin Ingi**
Hjartaliga tillukku við 8 ára føðingardegnum 21. febr. Alt tað besta ynskist tær. Jesus signi teg.
**Mamma, babba, Heidi og Dávid**



**Góði Hans Kári-gubbi**
Tillukku við 16 ára føðingardegnum 22. febr. alt tað besta í framtíðini. Heilsan vit øll
**Dánjal**



Tær verður ynskt hjartaliga tillukku við teimum 35 árunum.
**Bestu heilsanir systir tín v/familju**



**Góði fitti Sverri**
Hjartaliga tillukku við 10 ára degnum tann 21. febr.
**Ynskja omma og abbi**

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Veðrið Bilar Lýsingar Tíðindi Viðmerkingar Ítróttur Nøvn Skráir Tiltøk
Sosialurin

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

**Heilsanir** 30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

## Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á míðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ......................................................................
Bústaður: ......................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«